# Ámanakkin í 75 ár

**Tann 75. Álmanakkin hjá H. N. Jacobsens Bókhandli er útkomin – hesaferð við myndum av skipum yvir 20 tons**

ÁLMANAKKI
*Tíðindaskriv*

Síðani 1928 hevur H. N. Jacobsens Bókhandil givið Álmanakkan út á hvørjum ári, og tað hevur við sær, at Álmanakkin 2003 er tann 75. í røðini.

Í samband við rundu útgávuna eru nógvar ábøtur gjørdar fyri at gera álmanakkan enn betur. Størsta broytingin er, at listin við skipum yvir 20 tons er nú skrýddur við myndum av skipunum, og í tí sambandi verður Álmanakkin nú, allur sum hann er, prentaður í litum.

Í fyrsta parti er sjálvur ámanakkin 2003, mána- og sólstøður og annað, sum vert er at vita um stjørnur og himmalhválvið komandi ár. Har fáa vit m.a. at vita, at ein sólarmyrking verður at síggja í Føroyum 31. mai 2003, og mánamyrking verður bæði 16. mai og 9. november. Harumframt hendir tað sjáldsama komandi ár, at gongustjørnan Merkir fer fram við sólini 7. mai 2003.

Síðani koma nógv nýttu streymkurvarnar, streymtalvan og streymkort saman við lista yvir motorbátar undir 20 tons. Listin við føroyskum skipum yvir 20 tons er sum áður nevnt myndskrýddur, og tað hevur við sær, at hann er meir enn 100 síður langur nú. Í pørtunum um bátar og skip eru eisini komnir hendir upplýsingar um Fiskamarknaðin og yvirlit yvir løggildaði virkir, verksmiðjuskip og frystiskip og yvirlit yvir løggildaðu landingarmiðstøðirnar. Fyri skip og bátar er harumframt hópin av øðrum tilfari, sum er hent at hava við hondina.

Eitt nýtt kort er yvir ali- og smoltstøðirnar í landinum, har eisini tey ymisku aliøkini eru á. Saman við hesum korti er eitt nýtt dagført yvirlit, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur gjørt.

Í síðsta partinum við hentari vitan eru øll yvirlitini sjálvandi dagførd. Hetta hevur við sær, at nýggja løgtingsmanningin og nýggju landsstýrisráðini eru við, eins og nýggj hagtøl eru til mannstalslistan og fólkanøvnini. Av serligum áhuga hesu ferð er sjálvandi eisni, at Vágoyggin er komin uppí yvirlitið yvir vegalongdirnar á meginøkinum, so nú ber til at síggja, hvussu langt tú skal koyra, tá tú um stutta tíð ætlar tær við bili úr Fuglafirði til Sørvágs.

Nógvu broytingarnar hava við sær, at síðutalið er økt úr góðum 340 upp í góðar 420 síður. Hetta hevur tó ikki við sær, at álmanakkin er vorðin størri í vavi, tí pappírið er heldur tynri, so enn ber til at hava álmanakkan liggjandi júst har tær hóvar best. Hóast Álmanakkin 2003 er nógv øktur, er prísurin tann sami sum undanfarin ár, nevniliga 180 krónur fyri innbundnu og 130 krónur fyri vælkendu heftu útgávuna.



*Hesaferð er Álmanakkin skrýddur við myndum av skipum yvir 20 tons*




# Minningarorð um ommu okkara, Ásu Høj



Góða omma, ja, nú eru tað skjótt tríggir mánaðir síðani, tú fórt hesum foldum frá, heim til Jesu pápa. Sjálvt um saknurin er stórur, so finna vit troyst í Guði, tí vit vita, at tú, omma setti títt álit á Jesus, og tað vildi tú eisini, at øll onnur skuldu gera. Tað er við takksemi í hjartanum, at vit kunnu minnast teg, sjálvt um tú, næstan alt eg minnist, vart plága av sjúku, so vart tú altíð smílandi og glað.

Sum lítil var eg altíð saman við tær og abba og tit vóru altíð so góð við meg. Eg elskaði at sova niðri hjá tykkum at fara oman á Høvdan at keypa fyri tykkum, tí so visti eg, at eg altíð fekk eitt oyra afturfyri. Eg eri eisini takksamur fyri allar tær ferðir tú og abbi hava biðið meg sett mítt álit á Jesus.

Tá Kristina kom í familjuna, vóru tit so glað og góð við hana. Eisini tá so tann stóri dagurin hjá okkum kom tann 20. juli, so kundi tú tíverri ikki verða við, tí tú lást á sjúkrahúsinum. Vit komu tá at vitja teg brúðarnáttina uml. kl. 04.00 á morni, og tá vart tú so glað, og vit fingu kaffi og køkur.

Tann 5. aug. andaðist tú og fórt heim til Harran, men vit vita, at vit skulu síggja teg aftur har heima ein dag, vit sum hava sett okkara álit á Jesus. Vit koma øll at savnast aftur.

Í Jóhs. 3,16 stendur soleiðis: "Tí so elskaði Gud heimin, at hann gav Son Sín, hin einborna, fyri at hvør tann, ið trýr á Hann, skal ikki fortapast, men hava ævigt lív."

Tað var hetta tú gjørdi, omma. Tú elskaði Jesus, livdi fyri hann og tú lat okkum øll vita av tí.

Góði abbi, vit ynskja, at Jesu pápi skal vera hjá tær og styrkja teg, nú tú hevur mist tína konu.

Og um tað er nakað, sum vit skulu hjálpa tær við, so mást tú endiliga siga frá, vit elska teg og eru so góð við teg. Tú skalt vita, at vit eru altíð her fyri teg.

Við hesum vilja vit lýsa Harrans frið yvir minnið um elskaðu ommu okkara Ásu Sólbrún Høj.

**Kristina og Jógvan Martin Hansen**






# Ætlanin við ALS eydnaðist

**Hetta er greiða niðurstøðan hjá leiðslu og nevnd, nú Arbeiðsloysisskipanin hevur 10 ár á baki. Við hálvari milliard í rygginum er ALS í dag væl konsolideráð og brynjað til at standa ímóti eini møguligari kreppu.**

HÁTÍÐARHALD
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Elisabeth O. Gaardbo, stjóri í ALS, bjóðar vælkomin til 10 ára hátíðarhald í Norðurlandahúsinum hósdagin. Talið á arbeiðsleysum er nú komið niður á góð tvey prosent, og ALS skipanin hevur seinnu árini havt møguleika at leggja pengar til síðis, so eginognin í dag táttar í hálva milliard krónur.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Forkvinnan í stýrinum fyri Arbeiðsloysisskipanina valdi at tríva í orðini úr søguni hjá H.C.Andersen um »at først skal man gå så gruelig meget igennem, før man bliver lykkelig«, tá hon við einum setningi skuldi lýsa gongdina, nú ALS hevur 10 ár á baki.

Og hátíðarhaldið í Norðurlandahúsinum í samband við 10 ára dagin hjá ALS var eisini merkt av hesum orðum. 1.august 1992 varð á fyrsta sinni goldið úr Arbeiðsloysisskipanini og fyrstu árini var brekkan brøtt hjá ALS. Hóast inngjaldið var høgt, heilt upp í 2,75 prosent, so var fyrstu árini fleiri ferðir neyðugt at útvega skipanini meira pengar, skuldi hon klára sínar skyldur mótvegis mongu arbeiðsleysu føroyingunum. Ikki fyrr enn í 1996 hevði ALS á fyrsta sinni yvirskot, og síðan hevur gingið rætta vegin. Seinnu árini hevur Arbeiðsloysisskipanin verið før fyri at seta pengar til síðis, og við árslok í ár fer eginognin at tátta í 480 milliónir krónur. Henda gongd hevur eisini ført við sær, at inngjaldið til skipanina er lækkað fleiri ferðir, og á nýggjárinum lækkar tað niður í 0,5 prosent.



*Talið av arbeiðsleysum er støðugt minkað síðan 1995, og er í dag nærum komið niður á 400 fólk.*

Karin Kjølbro, sum hevur verið forkvinna í stýrinum fyri ALS síðan 1996, segði millum annað, at stýrið bað politikararnar um arbeiðsfrið, tað fekk stýrið, og nýtti hon eisini høvi til at takka fyri tað.

– Endamálið er, at ALS framvegis skal vera óheft, av politisku skipanini og partapolitiskum kjaki, men ein skipan, ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir umsita, segði Karin Kjølbro millum annað. Hon vísti á, at ALS er eindømi í mun til okkara grannalond, m.a. tí at skipanin ikki fær pengar frá tí almenna, eingi beinleiðis krøv verða sett til aktivering av arbeiðsleysum, og harumframt eru Føroyar at rokn sum eitt arbeiðsøki.

Forkvinnan í stýrinum sigur, at ALS í dag er brynjað til eina møguliga nýggja kreppu. Hon vísir á, at tá tað gongur væl í samfelagnum, hevur tað tvinnanda faktorar á ALS: Meira kemur inn og minni fer út úr skipanini. Sama ger seg galdandi, tá búskaparliga gongdin versnar: tá verður meira útgoldið úr ALS, meðan minni kemur inn. So hóast inngjaldið lækkar á nýggjárinum, so fer tað at hækka aftur, gerst tað neyðugt, vísir Karin Kjølbro á.


*- Stýrið fyri ALS bað um arbeiðsfrið, tað fingu vit, og tað takka vit fyri, segði Karin Kjølbro, forkvinna í stýrinum fyri ALS, millum annað á 10 ára hátíðarhaldinum. Hon vissaði um, at í dag megnar ALS at standa ímóti eini møguligari búskaparkreppu.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## ALS skal endurskoðast

Nú ALS hevur 10 ár á baki hevur stýrið biðið Bjarna Djurholm, landsstýrismann í arbeiðsmarknaðarmálum, um at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða og eftirmeta skipanina. Hetta verður mett neyðugt, millum annað tí fleiri grundleggjandi spurningar standa ósvaraðir og tørva svar.

Millum annað skal støða takast til, hvørt Arbeiðsloysisskipanin er privat ella almenn. Um eitt inngjaldsloft skal setast í gildi aftur, um útgjaldið úr skipanini til arbeiðsleys skal hækka. Eisini skal metast um, hvørt lækkingin í inngjaldinum, sum kemur í gildi á nýggjárinum, møguliga eigur at nýtast til at leingja barnsburðarfarloyvi. Harumframt er ivi sáddur um, hvørt inngjaldið til ALS er at rokna sum ein skattur. Er niðurstøðan, at talan er um ein skatt, so er hetta í stríð við stýrisskipanarlógina

Arbeiðsbólkurin, ið landsstýrismaðurin skal seta í samstarv við partarnar á arbeiðsmarknaðinum, er ikki settur enn, men verður settur ein av fyrstu døgunum, segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, í síni røðu við hátíðarhaldið í Norðurlandahúsinum hósdagin.

Bjarni Djurholm vísti í síni røðu á, at ein meginregla við ALS er, at tað framvegis skal loysa seg at arbeiða. Og hann staðfesti samtíðis, at tað í dag er ósemja um, hvussu høgt útgjaldið úr skipanini skal vera. Eitt andstøðuuppskot um at hækka útgjaldið úr verandi 70 prosentum upp í 80 prosent av eini arbeiðsaraløn, liggur í løtuni í løgtinginum, og harumframt hava 20 fakfeløg kravt, at útgjaldið hækkar upp í 80 prosent.

## Fallandi arbeiðsloysi

Síðan ALS fór at virka fyri 10 árum síðan, er arbeiðsloysi broytt nógv. Elisabeth O. Gaardbo vísir á, at síðan 1993, tá arbeiðsloysi lá omanfyri 20 prosent, hevur tað verið javnt fallandi, og er í dag komið niður á umleið 2,2 prosent.

Síðan skipanin fór at virka, hevur ALS havt umleið 14.000 viðskiftafólk, ið hava fingið vanligan arbeiðsloysisstuðul og stuðul úr fiskavirkisskipanini. Tilsamans eru útgoldnar umleið 1,4 milliard krónur úr skipanini, hesi tíggju árini.

Nærum øll árini, ella líka síðan 1994, hava fleiri kvinnur enn menn verið arbeiðsleys. Talan hevur verið um eina javna gongd, har kvinnurnar hava umboðað ein vaksandi part av arbeiðsloysu føroyingunum. Í dag eru umleið 400 føroyingar arbeiðsleysir, tá eru tey í fiskavirkisskipanini ikki íroknað. 65 prosent av teimum eru kvinnur.



*Tá útgjaldið úr ALS var hægst, rindaði skipanin nærum 300 milliónir krónur í arbeiðsloysisstuðuli. Í dag er støðan ein onnur, og skipanin hevur nú konsolideráð seg við útvið 500 milliónum í eginpeningi.*